# Tekur tíð at virðismeta fiskavirkini



Tað tekur longri tíð enn væntað at virðismeta virkini í trotabúnum, men tey seks skipini í Faroe Fish 2, eru virðismett til 170 miljónir krónur

Mynd: Vilmund Jacobsen

**FREIST** Freistin at bjóða upp á ognirnar í búnum eftir Faroe Seafood og Faroe Fish 2, sum annars er úti 31. januar, verður helst longd í einar 10 dagar, tí virðismetingin av fiskavirkjunum hevur tikið longri tíð enn væntað

Vilmund Jacobsen

Eyðfinnur Jacobsen, sum bæði er bústjóri í trotabúnum eftir Faroe Seafood og Faroe Fish 2, væntar, at freistin at bjóða upp á ognirnar fer at verða longd nakrar dagar. Freistin er sett til 31. januar, men bústjórin væntar, at freistin helst verður longd einar 10 dagar ella so.

Orsøkin er, at tað tekur longri tíð enn væntað at virðismeta virkini, sum eru í trotabúnum. Tað er Skiftirætturin, ið hevur sett fólk til at virðismeta ognirnar kring landið.

Hinvegin eru tey seks skipini í Faroe Fish 2, Heykur, Falkur, Stelkur, Bakur, Rókur og Lerkur virðismett til 170 miljónir krónur.

Umframt tey seks skipini í Faroe Fish 2, eigur trotabúgvið umleið 2/3 av ísfiskatrolarunum, Jaspis og Ametyst og helmingin í felagnum sum eigur djúpvatnstrolaran, Ednu.

### Alt kann seljast

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at Jaspis og Ametyst eru lýstir til at verða seldir á tvingilssølu hin 12. apríl, og í hesum førinum er tað ein kreditorur, sum hevur kravt skipini seld.

Ognirnar hjá Faroe Fish 2, sum altso eru teir seks nevndu ísfiskatrolararnir, eru lýstar at verða seldar á tvingsilssølu hin 11. apríl.

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at allar ognirnar kunnu keypast, um avtalur eru gjørdar um sølu, áðrenn freistirnar renna út, men er eingin avtala, sum partarnir eru nøgdir við, fara ognirnar á tvingsilssølu.

**» ... allar ognirnar kunnu keypast, um avtalur eru gjørdar, áðrenn freistirnar renna út...**

EYÐFINNUR JACOBSEN



- Málið hjá okkum sum bústjórum er at fáa so nógv fyri ognirnar sum gjørligt – antin tær verða seldar undir einum ella í fleiri pørtum, sigur Eyðfinnur Jacobsen, bústjóri

### Stórur áhugi

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at stórur áhugi er fyri ognunum hjá trotabúnum, bæði fyri skipum og virkjum. Nógv hava spurt seg fyri, bæði úr Føroyum og uttanlands, og onkur boð eru longu komin.

- Málið hjá okkum sum bústjórum er at fáa so nógv fyri ognirnar sum gjørligt – uttan mun til, um tær verða seldar undir einum ella í fleiri pørtum.

Hann sigur, at ognirnar skulu seljast innan hálvan triðja mánaða, men eydnast tað ikki, fara tær á tvingsilssølu, sigur Eyðfinnur Jacobsen, bústjóri.

vilmund@sosialurin.fo

# Ørskapur at samráðast um sáttmálar í bestu tíð

**- Eg haldi, at tað er galopperandi ørskapur at samráðast um sáttmálar rundan um ársskiftið, ið er besta fiskitíð, sigur Mortan Johannesen, reiðari á Ennibergi**



- Vit plagdu at fara vártúrin beint eftir nýggjár, men nú hava vit so valt at gera ymiskt við skipið, sigur Mortan Johannesen, reiðari á Ennibergi

Vilmund Jacobsen

- Vártíðin er tann tíðin, sum vanliga roynist best hjá heimaflotanum, og hetta er eisini tíðin, tá skipini eystanfyri plaga at hava bestu veiði.

Tað sigur Mortan Johannesen, reiðari á flakatrolaranum, Enniberg.

Hann heldur, at samráðingarnar millum reiðarar og manningarfeløg heldur skuldu ligið, tá vártíðin er av, og summarið stundar til.

- Tað hevur verið vánaligt við upsa í seinnu hálvu av 2010. Nú fingu skipini endiliga nakrar fiskar aftur, og samstundis endaðu vit í sáttmálaloysi, og flotin liggur.

Hann vísir á, at tað er veturin og vártíðin, sum heimaflotin skal liva av, samstundis sum hetta er besta tíðin hjá flakatrolarunum eystanfyri.

Mortan Johannesen heldur, at samráðingar og sáttmálaloysi rundan um ársskiftið er galopperandi ørskapur, sum hann tekur til.

### Ikki klárir

-Vit eru ikki raktir av verkbanninum enn, tí vit hava ikki verið klárir at loysa. Ymiskt er gjørt umborð, nú skipið hevur ligið. Alt skipið er vaskað, ymiskar ábøtur eru gjørdar, og vit hava eisini fingið ein nýggjan ljósmotor.

Mortan Johannesen sigur, at Enniberg helst verður klárur at loysa um mánaðarskiftið januar/ februar.

- Vit plagdu at fara vártúrin beint eftir nýggjár, men nú hava vit so valt at gera ymiskt við skipið.

Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, hevur ikki valt at kalla skipini heim, sum eru á langfaraveiði, men bara tey, sum royna undir Føroyum.

Tískil eru eitt nú Gadus hjá JFK-Troli og Vesturvón hjá Framherja til fiskiskap, eins og rækjuskip, sum eisini fiska á fjarleiðum, heldur ikki eru biðin um at koma heim.

Nú tvey skip í sama bólki sum Enniberg longu eru til fiskiskap, spurdi vit Mortan Johannesen, hvat teir fara at gera, tá Enniberg er klárur at loysa.

- Tað havi eg ikki hugsað ítøkiliga um enn. So, tað veit eg faktiskt ikki í løtuni, er svarið hjá reiðaranum.

vilmund@sosialurin.fo